## Dinnafía og Jógvan Sofus Ferjá:

# Søgan hjá einum fiskimannahjúnum

## Samrøða


Óli Jacobsen
olij@sosialurin.fo



*Dinnafía og Jógvan Sofus Ferjá. Í hesi og komandi Miðvikum fær lesarin møguleika fyri at lesa áhugaverdu frásagnirnar frá teirra lívi.*

Vit fara nú undir eina røð, sum er grundað á frásøgn hjá Dinnufíu og Jógvan Sofus Ferjá frá Gjógv. Í apríl fylla tey 90 og 94 ár og vita eina rúgva at siga frá. Serkent fyri Dinnufíu er hennara heilt ótrúliga minni, har hon kann minnast smálutir, sum nærum eingin annar minnist til. Jógvan Sofus er kendur sum góður frásøgumaður. Dinnafía eigur meginpartin í samrøðuni, men parturin hjá Jógvani verður fyri ein stóran part frásagnir, hann hevur skrivað í Jólaboð frá sínum lívi.

### Ættin hjá pápa.

Pápi mín var Sjúrður á Rætt við Gjógv. Hann var sonur Olrik Christiansen. Mamma hansara æt Kristina úr Jógvansstovu við Gjógv og var gift niðan á Rætt.

30. apríl í 1870 gingu tveir bátar burtur við Gjógv við 16 monnum. Abbi var ikki við, men tveir beiggjar abba. Tann eldri var Hans Christoffur og var giftur við Kristinu. Tann yngri beiggin, sum bert var 16 ár, æt Jóan Jakku. Kristoffur var nokkso nýliga giftur, í 1869. Omma var við barn, og hon átti so eina dóttur 22. oktober 1870, og hon varð kallað Hansina Kristina Jacobina. Hansina Kristina var eftir Hans Christoffur og Jacobina eftir Jóan Jakku. Hon var mamma Gull-Símun, sum var kendur útróðrarmaður í Havn í mong ár.

Nøkur ár seinni giftist omma uppaftur við Olrik, abba. Tey blivu so verandi á Rætt. Tey fingu fýra børn saman. Fyrst eina dóttur, sum æt Elin Maria eftir ommu síni á Rætt, sum var slektað av Eiði uttan úr Húsinum. Hon giftist til Gjáar við Kristiani á Rætt. So fingu tey ein son, sum æt Óli Andrias eftir abba sínum í Jógvansstovu, sum æt Andrass ella Andrias og eftir einum beiggja hennara, sum var deyður av tuberklum, og sum kallaðist Óli.

So fingu tey aftur ein son, sum æt Kristian, eftir abba sínum á Rætt. Yngsta barnið, ið var pápi, sum varð kallaður Sjúrður eftir mammubeiggja sínum í Jógvansstovu, sum var burturgingin við Samløguni, sum gekk burtur 20. mars 1884 við 8 monnum, bert 14 ár eftir vanlukkuna í 1870.

Omma átti bert tveir beiggjar, og báðir eru deyðir ungir. Pápi hennara var eisini deyður, tá yngsta barnið var 6 ára gamalt, og tá var omma 20 ár. Tey vóru seks systkin í Jógvansstovu. Hetta var so slektin hjá pápa.

### Ættin hjá mammu

Mamma og pápi vóru einki petti í slekt, hóast tey bæði vóru gjáarfólk. Mamma var dóttir Jógvan í Jákupsstovu. Mamma hennara æt Birita Klein. Hon var slektað úr Sjúrðarstovu við Gjógv og giftist so inn í Jákupsstovu. Tey fingu so fimm børn. Ein var Andrias, Dia kallaður, sum gjørdist nærum 102 ár. Síðan Malena eftir Maluni, ommu míni í Sjúrðarstovu. Hon var slektað úr Oyndarfirði, men var gift til Gjáar. Maður hennarara var Andrias Klein, og omma mín Birita mintist ikki pápa sín. Hon var eitt ár, tá ið hann doyði av sjúku. Tey vóru fýra systkin. Poul Klein var ein beiggi, ein æt Elspa og tann elsti æt Jóan Petur. Hann doyði í bestu árum av tuberklum. Henda Elspa giftist so við Óla Debes, tá ið hon var 49 ár. Hon var triðja kona hansara.

Mostir mín Lena, hon var næstelst, giftist niðan á Rætt við Óla Andriasi pápabeiggja. So var tað mamma, hon æt Katrina eftir ommu síni í Jákupsstovu. Hon var slektað úr Svínáum og gift til Gjáar. Maður hennara æt Heini, men hann doyði í ungum árum. Hon var tó verandi við Gjógv. Triðja systirin æt Andrea. Hon giftist við Kristian á Fløtti við Gjógv, sum var skipari. Mamma hansara var slektað úr Jákupsstovu og gift við Petur Jakku á Fløtti. Tey vóru systkinabørn. Hon var systir abba, Jógvan í Jákupsstovu. Hon átti fyrst Kristian. Trý ár seinni átti hon ein son, sum æt Aksel. Hon doyði einar tríggjar vikur aftaná, at hann var føddur. Yngsta barnið hjá ommu og abba var mammubeiggi mín, Petur. Hann giftist inn til Klaksvíkar við Thalu, dóttur Samson.

### Fýra systkin

Vit vóru fýra systkin. Eg var elst og eiti Kristina Sofía, sum er blivið til Dinnafía. Eg eiti Kristina eftir ommu míni á Rætt, og Sofía eiti eg eftir einum systkinabarni mammu, sum var deyð av tuberklum, og sum var dóttir Poul Klein. So er tað Jógvan beiggi. Han eitur eftir abba í Jákupsstovu. Ein annar beiggi æt Óli eftir Olriki á Rætt, abba sínum. Pápi segði, at rætta navnið var Óli. Hildið var, at Olrik var fínari enn Óli. So átti eg eina systur, sum æt Birgitta Maria. Hon var gift inn til Klaksvíkar við Harry Matras. Bert eg sjálv livi eftir av systkjunum.

### Pápi var fiskimaður

Pápi var fiskimaður, og hann var fyri tað mesta við beiggja sínum Óla Andriasi, sum var skipari. Eitt skip, teir vóru við, var Star of Hope í Fuglafirði. Eg veit ikki um gamli Sámal Petur átti tað.

Men fyrst eg minnist, at pápi var til skips, var eg 5 ára gomul. Hann var tá við Arizonu. Tá var hann saman við Andriasi í Tarti, hvørs lívssøga hevur verið prentað í FF-blaðnum og í Sosialinum. Tað var Lorvíks Jóannes (Johannesen), sum átti skipið, og FF-blaðið hevur eisini havt frásøgn hjá dóttur hansara Doru m.a. um skipini hjá Jóannes.

Tað gekk nokk ikki so væl at fáa pengarnar tá í tíðini. Tíðirnar hava vist ikki verið tær bestu. Eg minnist, at mamma og pápi plagdu at tosa um hetta. Pápi hevði bílagt sær einar svartaskógvar, og so hevði hann ongar pengar fingið. Tá minnist eg, at pápi segði: "Bara svartaskógvarnir ikki eru farnir." Men pengarnir, teir komu so. Jóannes var ein ordiligur maður. Hann átti ikki bara Arizonu, hann átti eisini Kristiannu og Ortariu.

### Fyrsta grind í 28 ár

Í 1925 og 1926 førdi Óli Andrias Langanes, og í 1926 var tað, at ein grind kom í Funningsfirði, tá teir skuldu fara avstað. Tá hevði grind ikki verið í Funningsfirði í 28 ár. Hetta kom sum rímiligt er væl við hjá fólkinum.

Tað var so ofta, at skip lógu á Funningsfirði. Her lá Langanes eisini. Tað er meðan teir liggja her, klárir at fara, tá kom henda grindin.